## Fyrsta fíggjarætlanin fyri Eysturkommununa

Nú er fyrsta fíggjarætlanin fyri Eysturkommunu samtykt í bygdaráðunum í Leirvík og í Gøtu. Fíggjarætlanin javnvigar við 62 milliónum. 47,2 mió. fara til rakstur, 5,7 mió. fara til rentur og avdráttir, og 9,1 mió. fara til íløgur. Skattainntøkan verður mett at vera 56,5 mió. Á íløgusíðuni fara 8,5 mió. til liðugtgerð av barnagarðinum í Leirvík, meðan restin av íløgunum fara til liðugtgerð av útstykkingarvegi Undir Gøtueiði og til Gøtubrá í Norðragøtu. Íløgurnar verða fíggjaðar við avlopi av rakstri og av innistandandi peningi. Barnafrádrátturin er settur til 5.000 kr. og skattaprosentið til 21 %. Nettoskuldin hjá samanløgdu kommununi verður við ársbyrjan 2009 44 % av einari álíkning á 23 %.

*Kelda: www.gota.fo*

## Havnin 100 ár í Müllers Pakkhúsi



Hósdagin hevur Havnin verið fólkavald kommuna í 100 ár. Tí verður alment hátíðarhald í Müllers Pakkhúsi, har 100 ára búmerkið hjá Tórshavnar Kommunu verður avdúkað. Á skránni verður millum annað sangur við kvinnukórinum Cantabile undir leiðslu av Unn Patursson og hugleiðingar um fólkaræði í Havn í 100 ár eftir Sjúrð Skaale, undir heitium "- Hava vit tað ikki gott?". Aftaná haldið fæst ein biti – aftur við 100 borðfløggum! Tiltakið verður í Müllers Pakkhúsi 27. november 2008 kl. 16:00.



*Killybegs liggur í útnyrðingspartinum av Írlandi, við stuttum vegi til fiskileiðirnar í Írska havinum og í Norðurhøvum*



*Killybegs er ein av kendu fiskivinnubýunum í Írlandi. Hagar leitaðu føroyskir fiskimenn sær fyri 44 árum síðani*

Teir vóru kortini ikki fyri ongum, tí rættiliga nógvur hávur var at fáa. So nógvur, at tað kom meiri enn so fyri at teir umborð á Búgvanum máttu standa í kurvunum við rulluna, fyri ikki at verða kjaftbitnir av einum hávi!

### Góð tíð

Longu áðrenn Anthony Gielty yvirhøvur kom í samband við føroysku útróðrarmenninar fyri 44 árum síðani, hevði hann hoyrt rættiliga nógv um Føroyar í enska útvarpinum. Ella rættari sagt: um veðurlíkindi og øll tey mongu lágtrýstini, sum í tíð og ótíð fóru framvið vindbardu oyggjunum fyri norðan.

Hann átti um hetta mundið sín egna útróðrarbát, men kendi einki til fiskiskap við tílíkum línum, sum brúktar vóru í føroyskum farvatni.

Tað barst ikki betri á, enn at Anthony og ein annar maður, O'Sullivan av navni, fingu møguleikan at sleppa til útróður við Búgvanum.

Tíverri fyri teir báðar hendu ikki tey stóru frambrotini innan línuveiðu eftir toski á vesturstrond Írlands eftir hetta. Men bæði Anthony Gielty, Tórhallur Andreassen, Niels Edvard Olsen, Sigmund Dam og allir hinir fingu kortini nakrar góðar vikur saman.

- Eg minnist í øllum førum bara gott aftur á hesa tíðina, sigur Anthony Gielty.

# Syngjandi skald á Reinsarínum

**Saman við fýra royndum, føroyskum tónleikarum, fer tónaskaldið og songkvinnan, Katrina Petersen, at framføra egin løg í Reinsarínum í Tórsgøtu hóskvøldið**

KONSERT

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Komandi hevur ætlar Katrina Petersen at geva út fløgu við egnum løgum. Ein forsmakkur til hesa fløguna kann fáast hóskvøldið á Reinsarínum í Tórsgøtu, tá Katrina Petersen hevur konsert.

Tónasmiðurin og songkvinnan, sum er fødd og uppvaksin í Keypmannahavn við føroyskari mammu og donskum pápa, tók í 2005 diplomútbúgving sum sangari og sangpedagogur á Rútmiska Musikkkonservatorinum í Keypmannahavn. Dagliga undirvísir Katrina Petersen í sangi og klaveri á Tórshavnar Musikkskúla.



*Katrina Petersen, sum er uppvaksin í Keypmannahavn, er flutt til Føroya og undirvísir í sangi og klaveri á Tórshavnar Musikkskúla. Næsta ár gevur hon fløgu út við egnum løgum*

Teir fýra tónleikararnir, ið sita við ljóðførunum til konsertina, eru Leivur Thomsen, guitar, Bjarki Meitil, bass, Líggjas Olsen klaver og Rógvi á Rógvu á trummum.

Tað er Havnar Jazzfelag, ið skipar fyri konsertini, sum verður hóskvøldið klokkan 21.

## Jólahugni í Miðbýnum

Aftur í ár verður jólabýur verður settur upp í Tinghúsgarðinum í Havn, har felagsskapir, skúlaflokkar og onnur selja ymiskt og hava tiltøk. Umframt jólabýin er ætlanin at skipa fyri tónleiki og undirhaldi kring miðbýin. Jólabýurin letur upp í sambandi við, at jólatræið á Vaglinum verður tendrað leygardagin 29. november 2008. Inni á heimasíðuni hjá kommununi kunnu fólk, sum vilja selja ella undirhalda, fylla umsóknarblaðið út.

## Bók um múrin og aðrar ruinir

Føroya Fornminnissavn hevur útgivið bókina: "Nordisk Ruinseminar 2007. Færøerne 18. – 20. september 2007". Í bókini eru fyrilestrar, sum hildnir vóru á norðurlendskum ruinseminari, ið Føroya Fornminnissavn skipaði fyri í fjør. Í 2007 var Føroya Fornminnissavnið vertur fyri árliga ruinseminarinum, tí tey kunnu vísa á áhugaverdu fornminnini á miðaldar biskupssetrinum í Kirkjubø. Byggifrøðiliga og varðveitingarliga eru hesi fornminni av norðurlendskum eins og altjóða áhuga. Símun V. Arge, deildarleiðari, og Andras Mortensen, landsantikvarur, hava ritstjórnað útgávuna.

